Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingskvinna

Svarari: Eyðdis Hartmann Niclasen, landsstýriskvinna í heilsu- og orkumálum

Evni: Skanning av bróstkrabba á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Spurningar:

1) Er Sjúkrahúsverkið liðugt við útgreiningararbeiðið og fyrireikingarnar, sum skulu til fyri at seta MR-skanningar av bróstum í verk á Klaksvíkar Sjúkrahúsi?
2) Um ja, eru so skanningar av bróstum gjørdar í 3 Tesla skannaranum á Klaksvíkar Sjúkrahús?
3) Um nei, nær kann væntast, at fyrstu MR-skanningarnar av bróstum kunnu setast í verk?

Viðmerkingar:
Fyrr í ár svaraði landsstýriskvinnan til grein 52 a fyrispurning (52-079/2025), at væntandi verður útgreiningararbeiðið og fyrireikingarnar, sum skulu til fyri at seta MR-skanningar av bróstum í verk á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, klárt/klárar aftaná summarferiuna í ár.

Nú summarferian er farin aftur um bak, loyvi eg mær at seta henda fyrispurning, fyri at vita, hvør støðan er í hesum máli.

Á Løgtingi, 14. august 2026

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur